tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 27.06.2024 kl. 15:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, ~~Anita Vibergsdóttir~~, ~~Alvi Mortensen~~, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, Kristina Roest, Eyð Eidesgaard

Varalimir: Mina Joensen møtir fyri Alva Mortensen

Ikki møtt: Alvi Mortensen, Anita Vibergsdóttir, Bjarni Hammer

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 41/24 | 23/00096-4 | Sparkivøllurin í Trongisvági - umvæling |
| 42/24 | 23/00268-2 | Mýrifípan -støðulýsing av barnaansingini juni 2023 -Kari Joensen, leiðari |
| 43/24 | 24/00088-5 | Kommunusamanlegging tilmælið um ”Vegleiðandi fólkaatkvøða" nú álitið er handa 18. mars 2024 |
| 44/24 | 24/00164-2 | Mýrifípan -ansing tá verkfall er og stovnurin er stongdur |
| 45/24 | 24/00165-2 | FSR -Umsókn um eyka stuðulsjáttan til bygging av nýggja neystinum á Hvítanesi |
| 46/24 | 24/00177-2 | KF -Uppskot til Løgtingslóg um integratión til ummælis |
| 47/24 | 24/00189-2 | SEV -Hoyring um nýggjan leiðslubygnað í SEV |
| 48/24 | 24/00057-2 | Vegagerð -íbinda Heiðarveg við vøllin á Sevmýri |
| 49/24 | 24/00051-1 | Segloftið - Dagføring/víðkan av brunaskipan |
| 50/24 | 24/00054-1 | Útskifting av lyklaskipan á gomlu bygningunum hjá T.F. Thomsen á havnarlagnum |
| **Til kunningar** | | |
| 15/24 | 24/00095-3 | Kongavitjan 2024 |

| | | |
|---|---|---|

Kristin Michelsen, borgarstjóri kunnar um, at Alvi Mortensen hevur fráboða, at hann ikki kann møta til fundin í dag, og Anita Vibergsdóttir hevur eisini fráboða, at hon ikki kann møta til fundin í dag. Kristin Michelsen boðar frá, at Bjarni Hammer hevur fráboða, at hann møguliga møtir nakað seinni enn kl. 15.00.

Kommunustjórin hevur eftir áheitan av borgarstjóranum innkallað Mina Joensen, ið er annar (2) valdi tiltakslimurin á lista “F” Felagslistanum til kommunustýrisvalið 10. nov. 2020 at møta til býráðsfundin fyri Alva Mortensen. Hetta vegna tað at 1 valdi tiltakslimur Jónhild Midjord Nybo ikki fær møtt.

Kristin Michelsen boðar frá, at Mina Joensen hevur frammanundan havt sæti í býráðnum, og tekur sostatt sæti í býráðnum uttan atkvøðugreiðslu.

Kristin Michelsen lesur skránna og spyr um viðmerkingar. -ongin viðmerking.

**Til støðutakan**

## 41/24
## 23/00096-4 Sparkivøllurin í Trongisvági - umvæling

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 03.05.2024 | 33/24 |
| 2 Býráðið | 06.05.2024 | 29/24 |
| 3 Mentanarnevndin | 22.05.2024 | 30/24 |
| 4 Fíggjarnevndin | 06.06.2024 | 36/24 |
| 5 Býráðið | 06.06.2024 | 38/24 |
| 6 Býráðið | 27.06.2024 | 41/24 |

**Málslýsing:**
Gamla graslíkisvøllurin í sparkivøllinum í Trongisvági er tikin burtur orsakað av dálking.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
uml. 200.000 kr

**Tilmælið:**
Mælt verður til at útvega eykajáttan til at leggja graslíki á vøllin – ein meting frá Idémøblum sigur 170.000 kr.  Sostatt er tað ynskiligt at fáa ein fíggjarkarm áljóðandi 200.000 kr.

**Fíggjarnevndin 03. maj 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað, og tekur fíggjarnevndin undir við ætlanini. Málið verður beint í mentanarnevndini.

**Býráðið 06. maj 2024:**
Borgarstjórin mælir býráðnum til at málið verður beint í mentanarnevndina. -**Einmælt samtykt.**

**Mentanarnevndin 22. maj 2024:**
Nevndin mælir til at taka av tilboðnum frá Idé Møblum, áljóðandi 169.000 kr u/MVG.
Mint verður á at fáa stoypt garðin omanfyri, soleiðis tilfar ikki kemur inn á vøllin.

**Fíggjarnevndin 06. juni 2024:**
Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini, og at játtanin verður veitt við eykajáttan til §411 «Íløga skúlin». Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 06. juni 2024:**
Eimælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini. -málið skal hava tvinnar viðgerðir.

**Býráðið 27. juni 2024:**
Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**42/24**
**23/00268-2 Mýrifípan -støðulýsing av barnaansingini juni 2023 -Kari Joensen, leiðari**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 13.09.2023 | 11/23 |
| 2 Fíggjarnevndin | 25.09.2023 | 55/23 |
| 3 Býráðið | 28.09.2023 | 61/23 |
| 4 Sosiala nevnd | 15.02.2024 | 5/24 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.02.2024 | 3/24 |
| 6 Sosiala nevnd | 22.04.2024 | 9/24 |
| 7 Býráðið | 27.06.2024 | 42/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 28. Juni 2023**
Leiðarin av Mýrifípuni, Kari Joensen hevur sent kunning og støðulýsing til umsitingina og allar býráðslimir av barnaansingini hjá TVK.

Kunning um barnagarðin Mýrifípan 28. Juni 2023.

*Tá øll børnini, ið ynskja at koma í vøggustovu og barnagarð, eru byrjaði eftir summarfrítíðina, eru tað "bert" 4 barnagarðspláss og 2 vøggustovupláss tøk í barnagarðinum. Tað var ikki vantandi, at tað fór at verða so nógv børn, men av tí at tað er ansingartrygd skriva foreldur ikki børnini upp fyrr enn 1-2 mánaðir áðrenn tey skulu byrja. Eisini flyta familjur suður, 10 børn byrja í vøggustovu og barnagarð aftaná summarfrítíðina, sum akkurát eru flutt suður ella sum flyta suður í summar.*
*Børnini, sum eru fødd í Tvøroyrar kommunu seint í 2022 og fyrst í 2023 eru ikki skrivaði upp til vøggustovupláss, men tey fara at ringja og ynskja pláss til børnini, og so er tað tey sum flyta suður og ynskja ansing til teirra barn.*

**Lógargrundarlag:** *Løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 30. apríl 2018 1)*
***§ 3.*** *Kommunan kann geva børnum, sum búgva í kommununi, tilboð um pláss á dagstovni og dagrøkt og hevur ábyrgdina fyri virkseminum. Dagstovnur sambært hesi lóg er vøggustova, barnagarður, frítíðarheim o.a. Dagrøkt sambært hesi lóg er ansing av børnum í heiminum og á spælistovum.*
*Stk. 2. Dagstovnar og dagrøktir hava opið gerandisdagar í dagtímunum, men kommunan kann eftir tilmæli frá barnaverndarnevndini geva loyvi til, at dagstovnar kunnu hava opið alt samdøgrið ella í vikuskiftunum*
*Stk. 3. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um námsfrøðiliga stevnumiðið, starvsfólkasamanseting og virksemið á dagstovnum og dagrøktum.*

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið sosialunevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Sosiala nevnd 13. september 2023:**
Kari Joensen møtti á fundinum at greiða frá støðulýsing av Mýrifípuni. Yvirornað mælir Kari til, at Mýrifípan verður víðkað, soleiðis at pláss verður at hýsa fleiri børn.
Forkv. í sosialu nevnd mælir til, at børn, ið hava bústað í Tvøroyrar kommunu fáa framíhjárætt til ansingarpláss, tá bert 5 tøk pláss eru í vøggustovu, og 5 pláss eru tøk í barnagarðinum. Einmælt samtykt

Forkv. í sosialu nevnd heitur á umsitingina um at kanna kostnaðurin av at víðkað um ansingina við 2-3 vøggustovum evt. við einari einari «bingjuloysn», sum kann víðkast. –Einmælt samtykt

**Fíggjarnevndin 25. september 2023:**
Einmælt samtykt at endurskoða reglugerðina fyri barnaansingina og hvussu tørvurin á ansing kann røkkast. –málið verður beint í býráðið sum lukka mál.

**Býráðið 28. september 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini

**Kommunustjórin 13. feb. 2024:**
Forkv. Í sosialu nevnd ynskir at leiðarin av barnaansingini Mýrifípuni, Kari Joensen møtir á fundi í sosialu nevnd at umrøða hetta við børnum, ið tosa annað mál enn føroyskt, fyri at fáa eina lýsing av, um hetta er ein trupulleiki.

**Sosiala nevnd 15. februar 2024:**
Kari Joensen, leiðari av barnaansingini møtti til fundin og gav eina støðulýsing av støðuni, nú fleiri og fleir «fremmanda» børn eru í barnaansingini. Upplýst var at uml. 1/3 av børnunum í barnaansingini hava føroyskt sum annað mál. Kari Joensen sær hetta ikki sum ein trupulleika, men heldur sum eina avbjóðing hjá starvsfólkunum, at royna ávirka børnini og teirra foreldur at tosa føroyskt. Kari upplýsir, at hetta viðførur tó, at nógv børn tosa enskt mál í barnansingini.
Sosiala nevnd er kunnað.

***Fíggjarnevndin 22. februar 2024:***
*Málið var umrøtt og kunnað.*

***Kommunustjórin 9. apríl 2024:***
Leiðarin av Mýrifípuni gerð vart við í skrivi til umsitingina *dagft. 8. apríl 2024*, at eftirspurningurin eftir plássi í vøggustovu og barnagarði komandi summar, verður hægri enn stovnur kann nøkta.

> Leiðarin kunnar um at:
> **Onki pláss er eftir í vøggustovunum fram til summar 2025.**
> Hetta orsakað av, at eftir summarsteðgin verða tað tríggjar vøggustovur, *ein millumstova og tríggjar barnagarðstovur, við ávikavist 10, 10 og 11 børnum í hvørjari vøggustovu*, svarandi til í alt 31 børn. *(Av hesum er 4 børn úr Hovs kommunu meðan 1. barn úr Fámjins kommunu er uppskrivað til vøggustovu, at byrja 1. okt 2024)*
>
> ***Og viðv. barnagarðsstovunum verður heldur onki pláss eftir fram til summar 2025.***
> Tað verða íalt 57 børn deild í 3 barnagarðsstovur, har 19 børn verða í hvørjari barnagarðsstovu komandi summar.
>
> Í millumstovuni verða tað 10 børn í 4 ára aldri, sum eru klár at flyta í barnagarð, tá pláss verður fyri teimum. Orsøkin til millumstovuna er, at tað eru bert 14 børn, ið fara úr Mýrifípuni í forskúlan Gluggin komandi skúla ár, har 23 børn byrja eftir summarsteðgin.

*Í barnagarðsstovunum verða eftir summarsteðgin 2 børn úr Hovs kommunu og 1 barn úr Fámjins kommunu.*

Til støðutakan er, hvussu kommunan kann nøkta tørvin á barnaansing, har m.a støða má takast til, hvørt Mýrifípan møguliga skal raðfesta pláss til børn hvørs foreldur hava bústað í Tvøroyrar kommunu.

**Sosiala nevnd 22. april 2024:**
Sosiala nevnd mælir einmælt til, at børn hvørs foreldur hava bústað í Tvøroyrar kommunu hava fyrsta rætt til pláss í barnansingini.

Um Mýrifípan ikki kann veita ansingarpláss til børn, ið hava bústað í Tvøroyrar kommunu, *samstundis sum børn úr øðrum kommunum hava pláss í Mýrifípuni*, verður mælt til, at hesi verða uppsøgd við 3. mðr. freist.

Um pláss verður tøkt aftur, kann kommunan aftur innskriva børn úr grannakommunum, tó við tí fyrvarni um uppsøgn á 3mðr. freist, um børn úr Tvøroyrar kommunu fáa tørv á plássi.
Sum støðan er nú, fáa børn, ið longu eru innskrivað úr øðrum kommunum, uppsagnarskriv við uppsøgn til tann 1. jan. 2025, um tørvurin er á plássi til børn við bústaði í Tvøroyrar kommunu.
Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 27. juni 2024:**
Forkv. í sosialu nevnd greiðir frá, at samb. leiðaranum í Mýrifípuni, er tørvurin á ansing á børnum hvørs foreldur hava bústað í Tvøroyrar kommunu øktur við 6. børnum aftur at, síðani sosiala nevnd viðgjørdi málið í apríl 2024. Forkv. í sosialun nevnd mælir til broyting í tilmælinum hjá sosilaun nevnd 22. apríl 2024, at umsitingin uppsigur ansingina av børnum, *hvørs foreldur ikki hava bústað í Tvøroyrar kommunu*, til í seinasta lagið til tann 30. september 2024. Einmælt samtykt.

**43/24**
**24/00088-5 Kommunusamanlegging tilmælið um ”Vegleiðandi fólkaatkvøða"**

**nú álitið er handa 18. mars 2024**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 25.03.2024 | 15/24 |
| 2 Býráðið | 06.05.2024 | 22/24 |
| 3 Býráðið | 27.06.2024 | 43/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 19. Mars 2024**
Borgarstjórin mælir býráðnum til at viðgerða álitið frá arbeiðsbólkinum um kommunusamanlegging, har støða verður tikin til tilmælið um at skipa fyri ”Vegleiðandi fólkaatkvøðu um kommunusamanlegging”. Eisini mælir borgarstjórin til, at býráði heitur á arbeiðsbólkin um at arbeiða víðari við málinum, áðrenn býráðið tekur endaliga støðu til kommunusamanlegging á einum seinni býráðsfundi.

**Lógargrundarlag:**

- Løgtingslóg um kommunustýri, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 59 frá 22. mai 2023.
- Løgtingslóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 137 frá 22. september 2020
- løgtingslóg nr. 12 frá 22. februar 2007 um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur.
    - **§ 1.** løgtingslóg ásetir treytirnar fyri sjálvbodnum kommunusamanleggingum og eindum, ið sjálvbodnar samanleggingar ella kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur skulu halda seg innanfyri.
    - **§ 2.** Sjálvbodnar kommunusamanleggingar ella kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur kunnu verða framdar/framd innan hesar eindir:
        - 7) Suðuroy, t.e. Hvalbiar, Tvøroyrar, Fámjins, Hovs, Porkeris, Vágs og Sumbiar kommunur
    - § 3. Avtalur um kommunusamanlegging skulu hava fyrilit fyri:
        - 1) at stovnseta kommunueindir, sum eru samfeldar landafrøðiliga og samferðsluliga,
        - 2) Møguleikunum fyri at menna fólka-, vinnu- og búskaparviðurskifti,
        - 3) at røkja kommunuuppgávur, og
        - 4) at fólkatalið helst skal vera í minsta lagi 2000 borgarar.
        - Stk. 2. Reglurnar í stk. 1, nr. 1 og 4 eru ikki galdandi fyri útoyggjakommunur, ið hava ætlanir um kommunusamanlegging sínámillum.
    - § 4. Áðrenn avtalur um kommunusamanleggingar verða góðkendar av landsstýrismanninum sambært § 5, skal semja í minsta lagi vera um:
        - 1) kommununavnið, har heitið "kommuna" skal vera ein partur av navninum,
        - 2) staðseting um, hvar og hvussu kommunustýrið finnur sær sæti,
        - 3) mannagongd um samanlegging av fyrisiting,
        - 4) uppgerð av ognar- og fíggjarviðurskiftum,
        - 5) tíðarfesting um, nær samanleggingin skal vera fullførd, og
        - 6) um staðbundnar nevndir skulu verða settar.

- § 5. Avtalur um sjálvbodnar kommunusamanleggingar skulu góðkennast av landsstýrismanninum.
  - Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann, eftir góðkenning frá viðkomandi kommunum, umskipa og tillaga kommunumark, har kommunusamanleggingin ber við sær óhóskilig marknaviðurskifti. Eru ivamál um kommunumark, tekur landsstýrismaðurin avgerð í málinum.
  - Stk. 3. Avgerðir sambært stk. 1 og 2 eru endaligar innan fyrisitingina.
- § 6. Uttan mun til, um tað snýr seg um kommunusamanlegging, kann landsstýrismaðurin góðkenna eina umskipan av markinum í millum kommunur, um semja er teirra millum.
- § 7. Landsstýrismanninum verður heimilað at skipa fyri vegleiðandi fólkaatkvøðu um kommunusamanlegging eftir ásetingunum í kommunuvallógini.
  - Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta nærri reglur um vegleiðandi fólkaatkvøðu.

**Fíggjarligar avleiðingar: -**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**<u>Býráðið 25. marts 2024:</u>**
Kristin Michelsen mælir býráðnum til at taka álitið frá arbeiðsbólkinum um kommunusamanlegging til eftirtektar, og at heita á arbeiðsbólkin um at fyrireika upppskot til fólkaatkvøðu í Tvøroyrar kommunu, ið verður lagt fyri býráðsfundin í apríl. -Einmælt samtykt.

**<u>Kommunustjórin 4. mai 2024</u>**
Arbeiðsbólkurin hevur havt nakrar eftirmetingarfundir við kommunustyrið í Hvalba og á Tvøroyri í apríl og mai mðn., og hevur nú orðað eitt semjuskjal, ið er handa hvørjari kommunu sær hin 4. mai til støðutakan.

Kristin Michelsen, borgarstjóri kunnar um í fylgiskrivi til semjuskjalið, at á felagsfundi í Hvalba á flaggdegnum, har flestu kommunustýrislimir vóru møttir, varð samtykt at seta ein fylgibólk við kommunustýrislimum, sum saman við arbeiðsbólkinum skuldi orða eitt semjuskjal, við m.a. støði í lóg um sjálbodna kommunusamanlegging. Á fundinum í Hvalba á flaggdegnum bleiv samtykt, at borgarstjóranir skuldi verða í fylgibólkinum samt 2-3 kommunustýrislimir í hvørjari kommunu sær. Tvøroyrar kommuna varð umboða av borgarstjóranum og Jónleyg J. Bech, ið hava haft innanhýsis fundir við arbeiðbólkin.

Borgarstjórin upplýsir at arbeiðsbólkurin, og umboðini fyri Tvøroyrar- og Hvalbiar kommunu í fylgibólkinum taka undir við semjuskjalinum, og mæla umboðini fyri Tvøroyrar kommunu býráðnum til at taka undir við fyriliggjandi semjuskjali.

**<u>Býráðið 06. maj 2024:</u>**
Borgarstjórin mælir til, at býráðið samtykkir semjuskjalið sum fyriliggjandi, og at miða verður eftir at hava vegleiðandi fólkaatkvøðu um kommunusamanlegging á Tvøroyri og Hvalba samstundis um hálvan juni 2024. -Einmælt samtykt

**Kommunustjórin 18.06.2024:**
Fólkaatkvøða um sjálvbodnað kommunusamanlegging millum Tvøroyrar- og Hvalbiar Kommunu var leygardagin 15. juni 2024.

Spurningurin á atkvøðu seðlinum var:
Skulu Tvøroyri og Hvalbiar kommuna leggjast saman í eina kommunu?

Úrslitið av fólkaatkvøðuni á Tvøroyri var:

| | |
|---|---|
| JA til samanlegging: | 632, svarandi til 73,7% av teimum sum hava valt |
| NEI til samanlegging: | 222, svarandi til 25,9% av teimum sum hava valt |
| Ógildigar: | 4, svarandi til 0,4% av teimum sum hava valt |
| Vælrætt: 1.376<br>Á valið: 858<br>Valluttøkan: 62,4% | |

**Býráðið 27. juni 2024:**
Tvøroyrar býráð tekur úrslitið av fólkaatkvøðuni til eftirtektar. Borgarstjórin mælir til, at Tvøroyrar kommuna er jalig og opin fyri møguligar sjálvbodnari kommunu samanlegging, um kommunur í Suðuroynna ynskja at leggja saman við Tvøroyrar kommunu, og at hetta verður framt uttan nýggja fólkaatkvøðu á Tvøroyri. -Einmælt samtykt.

**44/24**
**24/00164-2 Mýrifípna -ansing tá verkfall er og stovnurin er stongdur**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 13.06.2024 | 14/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 27.06.2024 | 40/24 |
| 3 Býráðið | 27.06.2024 | 44/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 11.06.2024**
Forkv. í sosialu nevnd ynskir at nevndin viðgerð ansingargjøld nú verkfall hevur verði í 4 vikur, og barnagarðurin hevur verði stongdur.

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:** Kommunan innheintar í ansingargjøld -*galdandi fyri barnagarðin Mýrifípan, forskúlan Gluggin, og frítíðarskúlin*- kr. pr. mðr. 249.750,- hetta íroknað gjaldið fyri børn úr Hovs kommunu á kr. 37.200,-

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið sosialu nevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Sosiala nevnd 13. juni 2024:**
Sosiala nevnd mælir til ikki at innheinta ansingargjald í tíðini verkfall var. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 27. juni 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Sosialu nevnd ikki at innheinta ansingargjald í tíðini barnaansingin hjá Tvøroyrar kommunu var stongd vegna verkfall hjá FA. -Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 27. juni 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá sosialu nevnd og fíggjarnevndini, um ikki at innheinta ansingargjald undir verkfallinum, og at Tvøroyrar kommuna tí ikki innheintar ansingargjald fyri august. 2024.

## 45/24
## 24/00165-2 FSR -Umsókn um eyka stuðulsjáttan til bygging av nýggja neystinum á Hvítanesi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 27.06.2024 | 41/24 |
| 2 Býráðið | 27.06.2024 | 45/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 18.06.2024**
Umsitingin hevur hin 18.06.2024 móttikið skriv frá FSR, ið søkir Tvøroyrar kommunu um at veita eyka stuðulsjáttan á kr. 1,55 mió til bygging av nýggjum kapppróðrarneysti á Hvítanesi.

Tvøroyrar býráð samtykti einmælt hin 28. oktober 2021 stuðulsavtaluna millum TVK og FSR. Tá bleiv upplýst, at samlaði kostnaðurin av nýggja neystinum bleiv kr. 10,32 mió ex. mvg. Tvøroyrar býráð samtykti at veita kr. 6,5 mió. ex. mvg í stuðul, meðan Lokale og Anlægsfonden stuðlaði við kr. 3.8 mió.

TVK hevur eftir fylgjandi flutt/samtykt í stuðul til nýtt neyst d.d. **kr. 7,1 mió**

| *Dagf.* | *kr. mió.* |
|---|---|
| *27.12.2020* | *3,5* |
| *26.11.2021* | *1,5* |
| *01.12.2023* | *1,0* |
| *01.05.2024* | *1,1* |
| ***18.06.2024 íalt*** | ***7,1*** |

FSR skriva í umsóknini dagf. 16 juni 2024:

> *Byggingin av nýggja felagshúsinum hjá Froðbiar Sóknar Róðrarfelag er nú so væl áleiðis, at sjálvur bygningurin er liðugur uttan. Innanarbeiði eru ígongd har veggir eru lidnir og klárt er til installatiónir.*
>
> *El-arbeiðið er ígongd, og er annars klárt at seta alla endaligu liðuggerðina ígongd.*
> *Verkætlanin hevur verið ígongd í rúma tíð. Størri prísjavning á tilfari og arbeiði hevur verið í hesum tíðarskeiðinum og hevur hetta eisini ávirkað hesa verkætlan.*
>
> *Lokale og Anlægsfonden hevur játtað at vera partur av meirveitingini, við teirra parti, sum er 37% upp til 1.607.0000,-*
>
> *Fundir hava verið leypandi í bygginenvndini um gongdina í verkætlanini og á seinasta fundi var ein enda fíggjarætlan løgd fram, fyri at gera verkætlanina lidna innan næstu 2-3 mánaðarnar. Fleiri tilboð eru nú innkomin og sáttmálar gjørdir, og er seinasta dagføringing gjørd av fíggjarætlanini.*
>
> *Við hesum fer Froðbiar Sóknar Róðrarfelag at søkja Tvøroyrar kommunu um kr.: 1.550.000,00*
>
> *Við róðrarkvøðu, Froðbiar Sóknar Róðrarfelag*

**Lógargrundarlag:** Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:** TVK hevur avsett á FÆ2024, kr. 1,1 mió, sum fíggjarligur stuðul til bygging av neysti hjá FSR, ið eru fluttar FSR 01.05.2024.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 27. juni 2024:**
Fíggjarnevndin samtykkir einmælt at lata FSR, Froðbiar Sóknar Róðrarfelag stuðul á kr. 1.1 mió, til bygging av nýggjum neysti á Hvítanesi, ið er avsett á §525, FÆ2024.

Fíggjarnevndin samtykkir einmælt, at lata FSR, Froðbiar Sóknar Róðrarfelag eyka stuðulsjáttan upp til kr. 1,55 mió til bygging av nýggjum kappróðrarneysti á Hvítanesi, vísandi til umsókn frá FSR dagf. 18.06.2024. Fíggjarnevndin mælir til, at eyka stuðulsjáttanin verður veitt FSR við eykajáttan av innistandandi, og útgoldin á deponeringskonto eftir at góðkendur ársroknskapur hjá FSR ár 2023 verður latin Tvøroyrar kommunu, har í eisini roknskapur pr. 31. mai 2024 fyri byggiverkætlanina av nýggja neystinum á Hvítanesi. -málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 27. juni 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini.

**46/24**
**24/00177-2 KF -Uppskot til Løgtingslóg um integratión til ummælis**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 27.06.2024 | 46/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 21.06.2024**
Umsitingin hevur móttikið skriv frá løgfrøðinginum hjá KF, við uppskot til Løgtingslóg um integratión til ummælis.

Kunna verður um at talan er um nýggja lóggávu – ongin lóg er frammanundan, og hava kommunurnar ein týðandi leiklut í uppskotinum:

Sagt verður frá at Freistin at lati inn ummæli til Løgmáleráðið er hósdagin 1. august 2024.

Lógin leggur upp til at:

- *Skotið verður upp at landið skal býtast landafrøðiliga í integratiónsøkir.*
- *Kommunurnar í integratiónsøkinum skulu samstarva um ein felags integratiónssamskipara.*
- *Integratiónsøkini verða tey somu sum barnaverndarøkini.*
- *Eisini fáa kommunurnar skyldu til at veita skipaða málmenning á aldurssvarandi stigi á dagstovnunum.*
- *Lógin kemur í gildi 1. januar 2025 og er galdandi fyri tilflytarar, sum fáa uppihaldsloyvið eftir hendan dag.*

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan/kunning.

**Býráðið 27. juni 2024:**
Einmælt samtykt at beina málið í mentanar nevndina.

**47/24**
**24/00189-2 SEV -Hoyring um nýggjan leiðslubygnað í SEV**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 27.06.2024 | 45/24 |
| 2 Býráðið | 27.06.2024 | 47/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 26.06.2024**
Umsitingin hevur hin 24. juni móttikið teldupost frá løgf. hjá Kommunufelagnum við hoyring um nýggjan leiðslubygnað í SEV.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg nr. 59 frá 7. juni 2007 um um el og fjarhita, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 30. mai 2024 - (Elveitingarlógin)

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 27. juni 2024:**
Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við nýggja leiðslubygnaðinum hjá SEV. -Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 27. juni 2024:**
Borgarstjórin kunnar um ætlanina at broyta leiðslubygnaðin hjá SEV. Tvøroyrar býráð tekur einmælt undir við nýggja leiðslubygnaðinum hjá SEV.

**48/24**
**24/00057-2 Vegagerð -íbinda Heiðarveg við vøllin á Sevmýri**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 19.02.2024 | 15/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.02.2024 | 14/24 |
| 3 Býráðið | 29.02.2024 | 5/24 |
| 4 Fíggjarnevndin | 03.05.2024 | 29/24 |
| 5 Býráðið | 27.06.2024 | 48/24 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 14.02.2024)**
Nú SEV hevur skund tørv, at grava nýggjan SEV háspennings kaðal úr grótbrotinum undir Akurgerði og vestur eftir vegnum undir Heygnum, vil hetta viðføra, at vegurin undir Heygnum verður stongdur í eitt longri tíðarskeið, og umstøðurnar hjá borgarum at ferðast millum Froðba og Tvøroyri vera skerdar munandi.

Fyri at lætta um hesa støðuna, verður mælt til, at vegurin, ið gongur vestur gjøgnum Heiðarnar, verður gjørdur farbarur og íbundin landsynningshornið á vøllin á Sevmýri. Haðani førast fram við vøllinum og íbindast Tjaldursveg/Sevmýri. Talan er um vegagerð, sum er byrja fyri fleiri árum síðani, men enn ikki er gjørd liðug.

Talan er um uml. 250 metrar sum í resta, og hevur umsitingin fingið tilboð frá veitara, sum kann gera vegin farbaran fyri kr. 1.25 mió. *(hetta tó uttan asfaltering, gøtuljós og leiðingar)*. Hetta verður mett av teknisku deild, sum verandi lágur kostnaður, tá slíkt vegarbeiði vanl. Liggur hægri enn 10.tkr/m.

Onnur grundgeving fyri at liðugt gera vegin er, at hesin vil betra munandi um atkomuna millum Froðba og Tvøroyri, eins og bústaðarøki B1 liggur upp at vegnum.

Umsitingin mælir býráðnum til, at tekniska deild fær heimild at samráðast við teir 4 eigararnir av lendinum, sum farast skal ígjøgnum, og at tekniska deild, fær heimild til at gjøgnumføra hesa vegagerð.

Umsitingin mælir til at fáa heimild til at:
1. Samráðast við eigarar av lendi, har vegurin verður lagdur, um at fremja ognarbýti eftir viðlagda kortskjal.
2. Ognartaka lendi til vegagerð samb. heimild í §12 í Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. Mars 2022.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. Mars 2022

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2024 , ongin nágreina avseting er til hesa vegagerð, krevur tí eykajáttan. - Mælt verður til at fíggja verkætlanina av §625 bygging og løguframleiðsla.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið teknisku nevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Tekniska nevnd 19. februar 2024:**
Form. í teknisku nevnd mælir nevndini til at taka undir við tilmælinum hjá teknisku deild, at samráðast við eigarar av lendi, har vegurin verður lagdur, um at fremja ognarabýti eftir viðlagda kortskjal. Og um mett neyðugt, at ognartaka lendi til vegagerð. Einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá teknisku nevnd. Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 29. februar 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá tekniskunevnd og fíggjarnevndini.

**Kommunustjórin 21.04.2024:**
Umsitingin hevur samskift við:

1. Niels Petersen eigara av matr.nr 18b, sum hevur undirskriva avtalu um gerðabýtið/marknað umskipan við Tvøroyrar kommunu, har hann fær tilsvarandi part aftur av matr. nr. 23c.
2. Brandur Magnusson Kristensen, ið er eigari av matr. nr. 14 b, hevur undirskriva avtalu um at lata part av matr. nr 14b til ætlaðu vegagerðina, har hann afturfyri fær ibindingarveg til síni sethús.
3. Eyðbjørn Larsen, sum umboðar eigarar av matr.nr 22c, «Jacobina Thorsteinsson og eft. av Jonna S. Larsen». Hesi eru ikki áhuga í gerðabýtið, men ynskja tó at latað tað jørð, sum tørvur er á til ætlaðu vegagerðina fyri kr. 98,- /fermeturin.
4. Mortan Thorman Vang, eigari av matr. nr. 16, hevur upplýst á fundi við umsitingina, at hann ynskir at lata part sunnara enda av matr. nr. 16 til ætlaðu vegagerð. Ongin avtala er gjørt um gerðabýti, men hugsandi kundi verði eitt javnbjóðis gjald fyri m2.

**Fíggjarnevndin 03. maj 2024:**
Borgarstjórin kunnar um fyriliggjandi avtalur við eigarar, og mælir til, at heita á tekniskudeild um at projektera vegin samsvarandi fyriliggjandi avtalur og ætlan um vegaføring. Einmælt samtykt.

**Býráðið 27. juni 2024:**
Einmælt samtykt at beina málið í teknisku nevnd.

**49/24**
**24/00051-1 Seglloftið - Dagføring/víðkan av brunaskipan**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 06.03.2024 | 16/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.03.2024 | 19/24 |
| 3 Býráðið | 25.03.2024 | 11/24 |
| 4 Býráðið | 27.06.2024 | 49/24 |

**Málslýsing: Georg Müller tann 12.02.2024**

Pubbin og Pakkhús 5 eru ikki vard av nakrari roykvarnaraskipan. El-service, sum hava gjørt ABA-skipanina til Seglloftið og Pakkhús 4, hava kannað, um møguleiki er fyri at víðka verandi anlegg at umfata Pubbina og Pakkhús 5 eisini. Hetta er væl møguligt.

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Tilboð frá El-service: **139.680 kr/uttan mvg***

* tað eru ymisk fyrivarni at taka atlit til, sum eru viðmerkt í tilboðnum frá El-service. Tí kann væntast ein meirkostnaður, sum ikki er við í hesari metingini

**Tilmælið:**
Eg vil viðmæla at finna eina loysn fyri teir báðar gomlu bygningarnar, sum ikki eru vardir av nakrari roykvarnaraskipan. Upplagt er at brúka somu skipan sum Seglloftið og Pakkhús 4. Veitarin garanterar, at sjálvt um anleggið hevur nógv ár á baki, er eingin orsøk at skifta tað út við nakra nýggjari skipan, og at eingin forðing er fyri at binda í gomlu skipanina.

**Tekniska nevnd 06. marts 2024:**
Nevndin tekur undir við at hetta verður gjørt.
Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Kommunustjórin 10.03.2024:**
Ongin játtan er avsett á FÆ2024 til hesa íløgu. Mælt verður til, at hetta verður fíggja av §609 "bygging og løguframleiðsla", annaðhvørt við eykajáttan ella við at flytan av játtan.

**Fíggjarnevndin 14. marts 2024:**
Málið er viðgjørt og kunna. Fíggjarnevndin mælir einmælt til, at taka av fyriliggjandi tilboði uppá tilfar, og at arbeiði/uppsetanin verður framt -í mest møguligan mun-, av starvsfólkum hjá teknisku deild. -málið skal hava tvinnar viðgerðir í býráðnum.

**Býráðið 25. marts 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini. Málið skal hava tvinnar viðgerðir tá talan er um eykajáttan.

**Býráðið 27. juni 2024:**
Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

## 50/24
## 24/00054-1 Útskifting av lyklaskipan á gomlu bygningunum hjá T.F. Thomsen á havnarlagnum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 06.03.2024 | 17/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.03.2024 | 20/24 |
| 3 Býráðið | 25.03.2024 | 12/24 |
| 4 Býráðið | 27.06.2024 | 50/24 |

**Málslýsing: Georg Müller tann 14.02.23**

Tað er sett eitt lyklaskáp upp á veggin uttanfyri Seglloftið við einum lykli í, sum sambært rýmingarætlanini til ABA-anleggið (Automatisk brandalarmanlæg) skal passa til allar rýmingarvegirnar, sum eru umfataðir av ABA-anlegginum, og har er Pakkhús 4 eisini ein partur av anlegginum.
Av tí at lykilin til Seglloftið ikki passar til Pakkhús 4 og umvent, kann man ikki siga, at anleggið riggar, sum tað skal. Tað er ikki loyvt, smbrt. Suna Ernstsson frá El-Service, at hava meir enn 1 lykil í lyklaskápinum. Hann skal passa til allar rýmingarvegirnar, og tað ger hann ikki, sum nú er.
Av hesi orsøk er ABA-anleggið ikki endaliga góðkent, og kann tí heldur ikki geva boð beinleiðis til alarmsentralin í verandi løtu.

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Tilboð frá Sp/f Systemlyklar: **78.806 kr/uttan mvg**

**Tilmælið:**
Ein loysn uppá trupulleikan er at skifta øll lásini út við eina systemlyklaskipan; ein elektronisk skipan er besta loysnin.
Tekniska deild mælir eisini til at fáa Pubbina og Pakkhús 5 knýtt upp í somu skipan, so allir teir gomlu bygningarnir hava somu lásaskipan.
Hetta ger tað lættari at stýra ymisku leigumálunum í bygningunum, og er við til at framtíðartryggja einari útbygging av ABA-anlegginum, so tað eisini kemur at umfata Pubbina og Pakkhús 5.
Kommunan hevur longu eina lásaskipan, sum umfatar kommunukontórið og bygningin, sum húsar kontórunum hjá kommunustjóranum og borgarstjóranum. Ein víðkan av teirri skipanini, sum kommunan longu sjálv umsitur, kann gera, at lyklar o.a. kann umsitast í somu skipan av teknisku deild.
Um aðrir bygningar hjá kommununi koma uppí somu skipan seinni, er eisini møguleiki fyri at knýta teir uppí.

**Viðm.** Skúlarnir hava sína egnu elektronisku lásaskipan.

**Tekniska nevnd 06. marts 2024:**
Nevndin tekur undir við at hetta verður gjørt.
Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Kommunustjórin 10.03.2024:**
Ongin játtan er avsett á FÆ2024 til hesa íløgu. Mælt verður til, at hetta verður fíggja av §609 “bygging og løguframleiðsla”, annaðhvørt við eykajáttan ella við at flytan av játtan.

**Fíggjarnevndin 14. marts 2024:**
Málið er viðgjørt og kunna. Fíggjarnevndin mælir einmælt til, at taka av fyriliggjandi tilboði uppá tilfar, og at arbeiði/uppsetanin verður framt -í mest møguligan mun-, av starvsfólkum hjá teknisku deild. -málið skal hava tvinnar viðgerðir í býráðnum.

**Býráðið 25. marts 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini. Málið skal hava tvinnar viðgerðir tá talan er um eykajáttan.

**Býráðið 27. juni 2024:**
Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**15/24**
**24/00095-3 Kongavitjan 2024**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 06.06.2024 | 38/24 |
| 2 Býráðið | 06.06.2024 | 40/24 |
| 3 Býráðið | 27.06.2024 | 15/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 24.05.2024**
Tvøroyrar kommuna fær vitjan av Fríðriki kongi og Mary drotning 13. juni 2024, og verður Tvøroyrar Kommuna í hesum sambandi vertur fyri hátíðarveitslu í SALT á Drelnes kl. 19.00.

Skráin fyri vitjanina er, at Kongshjúnini vitjar í barnagarðinum Mýrifípuni, haðani fari verður vestur í plantaguna, har tey planta eitt træ í samband við at plantagan fyllir 100 ár í 2024.

Kongaskipið Dannebrog liggur við bryggju á Drelnes, haðani tað fer frá bryggju við kongsparinum kl. 22.00.

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:** Mælt verður til at fíggja vitjanini sum eykajáttan til §114, umboðan**.**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 06. juni 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað -Fíggjarnevndin mælir til at vitjanin verður fíggja við eykajáttan §115 íløgur í fyrisiting. Málið verður beint í býráðið eftir at greitt er, nær Kongavitjanin verður.

**Býráðið 06. juni 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað, einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini og málið verður tikið upp til nýggja viðgerð á einum seinum fundi.

**Kommunustjórin 21.juni 2024:**
Sum øllum kunnugt, bleiv Kongavitjanin, ið skuldi verða 11.-12. Juni 2024 fyribils avlýst. Avgerðin at avlýsa bleiv tikin av Løgmanni, orsakað av óvissu um verkfallið hjá FA kundi ávirka Kongavitjanina. Nú er uppskot, ið tó enn ikki er alment fyri vitjanina, fyrr enn grønt ljós er komið frá kongshúsinum at vitjanin verður frá 11.-13. juni 2025. Tað merkir, at vitjað verður í Havn mikudagin 11. juni, í Vági, Fámjin og á Tvøroyri hósdagin tann 12. juni

**Býráðið 27. juni 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

Fundurin lokin kl. 16:10_

Kristin Michelsen

~~Anita Vibergsdóttir~~

Mina Joensen

Jónleyg Jespersen Bech

~~Bjarni Hammer~~

Kristina Roest

Eyð Jóna Eidesgaard